# Vit eru verri fyri nú enn fyri tveimum árum síðani

**Hóast lønin hækkaði 9% í seinastu sáttmálasamráðingum, eru løntakararnir verri fyri nú, enn teir vóru fyri 1. mai í 1999, sigur Ingeborg Vinther**

LØNARSTRÍÐ
*Áki Bertholdsen*

Tað verða harðar samráðingar á arbeiðsmarknaðinum í vár.

Tað væntar í hvussu so er Ingeborg Vinther, forkvinna í Føroya Arbeiðarafelag.

Í ársfrágreiðingini, sum hon legði fyri aðalfundin hjá Føroya Arbeiðarafelag í gjár, segði hon, at royndirnar higartil hava víst, hvussu lítla virðing landsins myndugleikar hava fyri fakfelagsrørsluni. Tí eru allar orsøkir til at vænta harðar samráðingar

## Verri fyri nú

Ingeborg Vinther vísti á, at allir sáttmálar eru uppsagdir og tí standa nógvar samráðingar fyri durum nú í vár.

Hon sigur, at løntakarin er í veruleikanum verri fyri nú, enn hann var fyri 1. mai í 1999, tá ið hesin sáttmálin kjom í gildi.

– Hóast lønin hækkaði 9% seinast, eru alt so nógv dýrkað, at vit eru verri fyri nú, enn vit vóru frammanundan.

Hetta kemst av, at hesi bæði seinastu árini er keypiorkan minkað eini 10%. Tí er tað heilt greitt, at tað ber ikki til at fáa endarnar at røkka saman hjá teimum, sum bara hava eina vanliga løn.

– So natúrligt er, at krøv fara at verða sett um sámiliga lønarhækking.

– Umframt hetta er eisini eftirlønargjaldið, sum Landsstýrið sigur, at partarnir skulu tingast um við samráðingarborðið.

– Vit kunnu so ikki vænta, at samráðingarnar verða léttar í ár, heldur hinvegin, tí vit hava bert lønarhækkingar at kompensera ella bøta aftur við tað ið tikið verður frá okkum í skatti, meirvirðisgjaldi, eftirlønargjøldum, tolli og príshækkingum.

Ein onnur orsøk til, at hon væntar harðar samráðingar, er framferðin hjá Landsstýrinum í Brimlamálinum.

– Henda framferð hjá



*– Hesi bæði seinastu árini er keypiorkan minkað eini 10%. Tí eru vit verri fyriu nú enn vit vóru fyri tveimum árum síðani, hóast lønin hækkaði 9% í seinastu samráðingum, sigur Ingeborg Vinther á aðalfundi í Føroya Arbeiðarafelag í gjár*
*Mynd: Jens K. Vang*

Fíggjarmálastýrinum kann ikki annað enn vekja órógv innan fakfelagsrørsluna, tí áður hevur Løgtingið bert í serligum førum lagt seg út í lønartrætur, og tá bert, um semingsmaður frammanundan hevði sett fram semingsuppskot, sum so varð gjørt til lóg.

– Fakfeløgini hava alla tíðina mótmælt, at lóggávuvaldið skerjir samráðingarrættin hjá fakfeløgunum, men nú Fíggjarmálastýrið er farið enn longri, er verulig orsøk til at rópa varskó.

– Okkum eigur at vera greitt, at næstu ferð verða tað møguliga limir okkara, sum verða forðaðir í at fáa ásett lønarviðurskifti síni við sáttmálasamráðingum, tí her er talan um inntriv í sjálvan grundlógartryggjaða samráðingarrætt okkara.

## Eitt pennastrok

Ingeborg Vinther nevndi eisini karensdagarnar, ið løntakarin sjálvur má gjalda.

– Eingin vilji hevur verið at fáa karensdagarnar burtur, sjálvt um tað var lagamanni at gera og kravdi mest sum bert eitt pennastrok, men fyri tey alment løntu var tað eingin trupulleiki og einki hóvasták. Men tá tað kom til tey tímaløntu og onnur, ið koma undir dagpeningaskipanina, bar einki til. Tá ikki allir borgarar verða javnsettir mótvegis lógini, má tað sigast at vera berur illvilji, og vit kunnu ikki sum fakfelag góðtaka slíkt, sigur Ingeborg Vinther í ársfrágreiðing síni.

– Tað mest ótrúliga á politiska økinum er, at nú er triði landsstýrismaðurin skiftur út, og allir skulu teir hava løn í seks mánaðir, eftir at teir eru farnir frá. Tað sama er við teimum, ið sita í Løgtinginum. Hetta hevur landið ráð til, meðan nýggja vaktarskipið Brimil hevur ligið sum ein landaskomm við bryggju yviri í Noregi, tí yvirmonnunum umborð varð ikki unt sámiliga hýru, hesum monnum, sum liggja úti á havinum og ansa eftir fiskimarkinum og alla tíðina skulu vera tilbúnir, tá ið okkurt leikar á har úti.

Annars helt hon, at ófriður og ósemjur hava verið nógvar á arbeiðsmarknaðinum, meðan Karsten Hansen hevur verið fíggjarmálaráðharri.

– Nóg illa er ein ósemja farin afturvið borðinum, so hevur ein onnur hevur tikið seg upp.

Fakfeløgini hava verið lítið vird, má sigast, so hvussu fer at gangast í vár, nú allir sáttmálar eru uppsagdir, er ivaleyst ein góður spurningur. Men eg haldi, at allir løntakarar kunnu vænta, at samráðingarnar verða torførar og ringar at loysa.

Men hon hevði kortini gott mót og heitti á limirnar í Føroya Arbeiðarafelag um at standa saman og gera ein sterkan manngarð um meginfelag teirra, nú samráðingar fara at byrja í næstum.

– Tørvur er á øllum góðum kreftum, segði hon

# Samstarvið ikki so gott sum vónað

**– Samstarvið ímillum fakfeløgini í Føroyum er ikki so gott, sum Føroya Arbeiðarafelag hevði vónað, sigur Ingeborg Vinther, forkvinna í Føroya Arbeiðarafelag, í ársfrágreiðingini, sum hon legði fyri aðalfundin í gjár**

SAMSTARV
*Áki Bertholdsen*

Samstarvið ímillum føroysku fakfeløgini er ikki so gott, sum tað kundi verið.

Tað heldur í hvussu so er Ingeborg Vinther, forkvinna í Føroya Arbeiðarafelag.

Hon sigur, at í Føroyum hevur tað tíverri verið soleiðis, at ikki hevur borið til at samskipa fakfelagsrørsluna.

Í ársfrágreiðingini, sum hon legði fyri aðalfundin í gjár, segði hon, at tá ið royndir hava verið gjørdar at samskipa fakfelagsrørsluna, hevur altíð okkurt stungið seg upp, ið hevur loypt split í.

– Sjeymannabólkurin varð skipaður í teirri vón, at nú fór at bera til at fáa eitt gott og gevandi samstarv ímillum fakfeløgini.

Ingeborg Vinther sigur, at samstarvið í sjeymannabólkinum var fyrimyndarliga gott alla ta fyrstu tíðina. Men hon helt, at tað tíverri ikki var so gott longur, ið vónað varð.

– Fyritreytin fyri góðum samstarvi er fyrst og fremst sínámillum álit og ikki, at feløg troka seg inn á økið hjá hvørjum øðrum og kradda sær limir har.

– Hetta skuldi tú allarminst væntað úr feløgum, tú hevur havt samstarv við. Hetta er at bróta niður tað, ið roynt hevur verið at bygt upp í felagsskapsins anda.

Ingeborg Vinther minti í hesum sambandi á stríðið, ið tók seg upp ímillum Føroya Arbeiðarafelag og Starvsmannafelagið í sambandi við dagrøktarar. Hon segði, at tá royndi Starvsmannafelagið at skipa dagrøktarar í felagið, hóast teir frammanundan vóru í limafeløgum hjá Føroya Arbeiðarafelag.

– Hetta hendi, eftir at vit vóru farin at taka dagrøktarar inn í limafeløgini.

– Við øðrum orðum fór Starvsmannafelagið við vilja inn á eitt annað felagsøki, og hetta er ikki fyrstu ferð, hetta felag hevur otað seg inn á økið hjá Føroya Arbeiðarafelag, sigur Ingeborg Vinther.

Hon helt eisini, at limirnir í Føroya Arbeiðarafelag mintust kravið frá Havnar Arbeiðsmannafelag um at jarðleggja Kollafjarðar Arbeiðsmannafelag, sum hon málbar seg, og flyta limirnar í feløgini í Havn.

Somuleiðis hevur Tórshavnar kommuna lagt seg út í limaviðurskiftini hjá teimum, ið eru limir í Kollafjarðar Arbeiðarafelag, heldur enn at Havnar Arbeiðsmannafelag royndi at fáa eina samstarvsavtalu í lag við Føroya Arbeiðarafelag.

Ingeborg Vinther segði, at tá ið limirnir í felagnum í Kollafirði vilja varðveita sítt egna felag, fer Føroya Arbeiðarafelag sjálvsagt at hjálpa teimum við tí.

– Hetta hevur sjálvandi gjørt sítt til, at samstarvið í sjeymannabólkinum ikki er tað sama fyri okkara felag, tí áðurnevndu feløg eru jú við í bólkinum.

– Men soleiðis er mangan í fakfelagsarbeiði, at mótstreymur er, og tey feløg, tú hevur stuðlað, eitt nú undir verkfalli, gloyma so skjótt, tíverri. Um so enn fakfelagsrørslan stendur spjadd, fara vit at royna at fáa sum frægast burturúr og at halda fram í góðum treysti, segði Ingeborg Vinther.

## Altjóða samstarv

Annars hevur Føroya Arbeiðarafelag í mong ár havt samstarv við fakfeløg, bæði í Norðurlondum og á altjóða stigi, av tí at FA er limur í altjóða arbeiðarafelagnum ILO.

Felagið hevur havt nevndarlim í Norðisk Union í 10–12 ár. Hetta samstarv meta vit at hava týdning fyri okkum, tí so eru vit alla tíðina vitandi um, hvat hendir á fakfelagsøkinum úti í heimi. Eisini er heimurin vorðin nógv minni, nú ið vit so at siga kunnu taka hann inn í stovu okkara gjøgnum sjónvarp ella teldu. Hetta fer vituliga at hava eina globalisering við bæði fyrimunum og vansum við sær, sigur Ingeborg Vinther í ársfrágreiðing síni.

– Vit ætlaðu, at samstarv í norðuratlantshavi ímillum Føroyar, Ísland og Grønland skuldi mennast enn meira. Tískil varð ráðstevna fyriskipað í Grønlandi, har vit høvdu eitt áhugavert evni at tosa um, nevniliga umhvørvið í havinum. Bogi Hansen varð biðin at halda fyrilestur um hetta, og hann greiddi hetta sera væl.

Ársfunðurin í VN skal í ár verða í Reykjavík í Íslandi. Tíverri hevur víst seg, at íslendska LO ikki er so áhugað í hesum samstarvi longur. Áhugin er størri fyri samstarvi í evropeiskum og altjóða høpi, hóast fleiri stór limafeløg í íslendska meginfelagnum vilja hava samstarvið millum fakfeløgini í Norðuratlantshavi at halda fram. Nú fæst so at síggja á komandi ársfundi, hvat fer at henda víðari við samstarvinum. Vónandi kemur rættlag í her, segði Ingeborg Vinther



# Hava onki gjørt fyri verkafólkið

**– Hesi seinastu árini er ikki ein tann einasta lóg, ið kann vera verkafólkinum at frama, samtykt á Føroya Løgting, sigur Ingeborg Vinther, forkvinna í Føroya Arbeiðarafelag í ársfrágreiðingini til aðalfundin í gjár**

ILLVILJI
*Áki Bertholdsen*

– Hesi seinastu árini er ikki ein tann einasta lóg, ið kann vera verkafólkinum at frama, samtykt á Føroya Løgtingi.

So bersøgin er Ingeborg Vinther, forkvinna í Føroya Arbeiðarafelag í ársfrágreiðingini, sum hon legði fyri aðalfundin í gjár.

Hon vísti á, at tað er uppgávan hjá einum og hvørjum fakfelag at fylgja væl við og tala at, tá ið førdi politikkurin ger lívsumstøðurnar hjá løntakarunum verri.

– Limirnir í fakfeløgunum hava sum vera man ymiska politiska áskoðan, og tí eiga fakfelagsleiðslurnar ikki at taka dagar ímillum, hvørjir politisku flokkarnir eru, sum mynda tær ymisku landsstýrissamgongurnar, tí tað er í øllum førum skyldan hjá fakfelagsleiðslunum at vísa á skeivleikarnar í førda politikkinum.

Hon helt eisini, at tað er sera umráðandi, at fakfeløgini nýta demokratiska rætt sín til at tala at, tá politisku ella umsitingarligu myndugleikarnir ikki tykjast at hava áhugamálini hjá vanliga løntakaranum í huga, tá lógir verða samtyktar ella kunngerðir verða settar í verk.

Stutt sagt segði hon, at øll fakfelagsfólk munnu helst ásanna, at neyvan nakrantíð hava so nógvar ósemjur verið á føroyska arbeiðsmarknaðinum, sum undir hesari samgonguni.

– Tað hevur víst seg, at Fíggjarmálastýrið og lønardeildin ikki hava víst hegni ella vilja til at gera semju við fakfeløgini, og hetta er uttan iva høvuðsorsøkin til tann ruðuleika, sum hevur valdað á arbeiðsmarknaðinum ein stóran part av tíðini, síðan samgongan tók við.

Hon nevndi síðani fleiri dømi um, har hon helt, at førdi politikkurin gekk ímóti áhugamálunum hjá vanliga løntakaranum.

– Við dagpeningaskipanini hevur eingin vilji verið at fáa karensdagarnar burtur, sjálvt um tað var lagamanni at gera og kravdi mest sum bert eitt pennastrok. Men fyri tey alment løntu var tað eingin trupulleiki og einki hóvasták. Men tá tað kom til tey tímaløntu og onnur, ið koma undir dagpeningaskipanina, bar einki til. Tá ikki allir borgarar verða javnsettir mótvegis lógini, má tað sigast at vera berur illvilji, og vit kunnu ikki sum fakfelag góðtaka slíkt, sigur Ingeborg Vinther.



*– Endamálið við førda politikkinum tykist at vera, at hvør skal vera sær sjálvum næstur, og tað er tíverri soleiðis, at hugtakið samhaldsfesti er alsamt minni virt millum okkara fólkavaldu menn og kvinnur, sigur Ingborg Vinther í ársfrágreiðingini, sum hon las upp á aðalfundinum í gjár*
*Mynd: Jens K. Vang*

## Rópa varskó

Hon helt eisini, at tað vóru allar orsøkir til at rópa varskó í málinum um Brimil.

Skipið var liðugt bygt í fjør heyst, men Fíggjarmálastýrið hevði tá ikki megnað at fingið í lag sáttmála við manningarfeløgini, og tí hevur Brimil ligið í Noregi í fleiri mánaðir.

– Í staðin fyri at vísa vilja til at geva manningunum rímilig setanar- og lønarkor, valdi Fíggjarmálastýrið at leggja lógaruppskot fyri tingið um lønarviðurskiftini hjá manningini.

– Fakfeløgini hava mótmælt hesari mannagongd, har Fíggjarmálastýrið tváar hendur sínar og letur Løgtingið kroysta eina skipan niður yvir manningarfeløgini, hóast feløgini ikki vilja góðtaka slíka loysn.

– Henda framferð hjá Fíggjarmálastýrinum kann ikki annað enn vekja órógv í fakfelagsrørsluni, tí áður hevur Løgtingið bert í serligum førum lagt seg út í lønartrætur, og tá bert, um semingsmaður frammanundan hevði sett fram semingsuppskot, sum so varð gjørt til lóg.

Fakfeløgini hava alla tíðina mótmælt, at lóggávuvaldið skerjir samráðingarrættin hjá fakfeløgunum, men nú Fíggjarmálastýrið er farið enn longri, er verulig orsøk til at rópa varskó.

– Okkum eigur at vera greitt, at næstu ferð verða tað møguliga limir okkara, sum verða forðaðir í at fáa ásett lønarviðurskifti síni við sáttmálasamráðingum, tí her er talan um inntriv í sjálvan grundlógartryggjaða samráðingarræt t okkara, sigur Ingeborg Vinther.

Uppskotið, sum ætlanin var at leggja fyri tingið um nýggja semingslóg er enn eitt dømi.

– Hetta uppskotið var ein roynd at føra inn á føroyska arbeiðsmarknaðin reglur, sum í veruleikanum vildu forða fakfeløgunum at lýsa verkfall, hóast allir sáttmálar vóru farnir úr gildi.

– So at siga øll fakfelagsrørslan mótmælti tó harðliga hesum lógaruppskoti, og hetta førdi við sær, at uppskotið ikki varð lagt fyri tingið.

Somuleiðis vórðu uppskot frá andstøðuni um trygdina hjá løntakarunum feld, hóast líknandi reglur eru í grannalondum okkara. Talan var um uppskot um reglur fyri hópuppsagnum og reglar um trygd hjá arbeiðsfólkið, tá ið virki, tey arbeiða á, verður selt.

## Lítil virðing fyri fakfelagsrørsluni

Hon heldur, at tað er hugstoytt, at tey sum ráða fyri borgum í Føroyum, ikki vísa størri virðing fyri tí samfelagsbólki, sum eigur stóran part av æruni fyri menningini og framburðinum í samfelag okkara. hon helt eisini, at tað er ilt at skilja, at stórur partur av politikarum okkara ikki unnar hesum løntakarum størri sømdir, men hinvegin tykjast at royna at leggja forðingar í vegin fyri einum og hvørjum bata í lívskorunum hjá teimum, sum frammanunðan hava tey vánaligastu korini.

Í ársfrágreiðing síni sigur Ingeborg Vinther, at seinnu árini hava vit sæð sjónlig tekin um, at førdi politikkurin hjá lanðsstýrinum ber á skeiva bógvin, tá talan er um áhugamálini hjá limum okkara, og at lóggávan miðvíst tykist at royna at fáa minni og minni samhaldsfesti í samfelag okkara.

– Endamálið tykist at vera, at hvør skal vera sær sjálvum næstur, og tað er tíverri soleiðis, at hugtakið samhaldsfesti er alsamt minni virt millum okkara fólkavaldu menn og kvinnur.

– Hetta er eitt rák, sum gongur beint ímóti tí, sum fakfeløgini hava stríðst fyri, nevniliga. at tey í samfelag okkara, sum hava breiðastu herðarnar, eisini skulu bera lutfalsliga størra partin av útreiðslunum, sum tað kostar at reka samfelagið, sigur Ingeborg Vinther.






Bussferð til
PÓLAND
25. mai-4. juni
Kostnaður
7.535,-

Íroknað prísinum er flogferð, full pensión, 8 nætur í Pólandi, atgongd til søvn og ferðaleiðari.

MB-Tours
Bryggjubakki 2 · P.O. Box 3021 · FO-110 Tórshavn
Tel +298 32 21 21 · Fax +298 32 21 22
mb-tours@mb-tours.com · www.mb-tours.com

www.reproz.com